

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 05 - 2012

# Statoil vil bara hava teir bestu heilarnar

Norska Statoil vil bara hava teir bestu heilarnar, nú felagið hevur sett sær fyri at fáa meiri burtur úr sínum oljukeldum. Felagið hevur lagt seg eftir tøkniligari menning, og eitt av málunum er nú at fáa meiri burtur úr oljuleiðunum. Fyri at røkka málinum ætlar felagið at fáa fatur á teimum bestu norsku og útlendsku teknologunum í komandi árum. Og tað er sanniliga ikki hvør sum helst, ið sleppur ígjgønum nálareygað. -Vit vilja bara hava tey bestu. Tey, sum eru ovast. Í dag eru tað ikki pengarnir, sum tálma ella forða, men heldur tað at finna nóg mikið av dugnaligum fólki, sigur Karl Johnny Hersvik, granskingar- og menningarleiðari hjá Statoil, við Aftenbladet. Uttan fyri felagsins dyr ætlar Statoil at stimbra og menna eitt nú gransking og menning í akademiskum umhvørvum, hjá samstarvsfeløgum og við at stovna stuðulsskipanir fyri studentar. -Vit mugu brúka pengarnar, har heilarnir eru, og vit rokna við, at helmingurin av tí teknologiska førleikanum, sum vit fáa brúk fyri, verður uttan fyri sjálvt felagið, sigur Karl Johnny Hersvik. Skal vera fremst Sum er brúkar Statoil 500 milliónir dollarar um árið til gransking og menning, og tey seinastu árini er játtanin vaksin 25 prosent um árið. Hersvik væntar, at játtanin fer eisini at veksa í komandi árum. Samstundis væntar hann, at felagið fer at seta umleið 160 fólk í starv uttanlands, og fleiri teirra skulu vera millum tey dugnaligastu, um Statoil skal røkka málinum um at vera oddafelag í vinnuni. -Innan gransking og menning verður Statoil á odda í heimshøpi, sigur Hersvik.